# Hava góðar vónir

**Hóast sáttmálarnir ganga út í summar, hevur Pauli Einarsson nú útvegað sær so nógvar royndir, at hann hevur góðar vónir um at halda fram við virkseminum**

OLJUVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyska oljuvinnan tók ikki slíkt dik á seg, sum vónað. Og ein av teimum, sum er komin at hanga eitt sindur í leysari luft, er OSR á Tvøroyri, sum er okkara einasta fyritøka av sínum slagi í landinum.

OSR hevur sáttmálar við oljufeløg um at vera til reiðar at basa eini møguligari oljudálking.

Samstundis fevnir sáttmálin um, at OSR skal vera til reiðar, verður havið hinumegin markið dálkað av olju í sambandi við oljuboring har.

Sáttmálarnir ganga út í juni og spurningurin er, hvussu framtíðin hjá OSR sær út, nú ongin boring verður í Føroyum enn á sinni.

Pauli Einarsson, stjóri í OSR, sigur, at spurningurin er, um oljufeløgini halda tað vera rætt at varðveita sáttmálarnar ímeðan onki hendir.

Men hann vísir á, at eisini tá ið talan er um dálking beint hinumegin markið, er OSR nærmast at koma til hjálpar.

So tað er avgjørt møguleiki fyri at kunna halda fram, men enn er onki avgjørt.

– Annars hava vit bjóðað okkum fram at hjálpa har vit kunnu til at basa eini dálkidálking, sama, hvar í verðini hon er.

Hann vísir til, at tá ið herviliga dálkingin var í Spania nakað síðani, fór útgerð frá OSR á Tvøroyri til Spania, har hon var brúkt at taka olju upp av sjónum við.

OSR er einasta felag í landinum, sum er útgerð og fólk við venjing til at basa eini oljudálking.




*Pauli Einarsson á sølustevnu á Tvøroyri um vikuskiftið, har hann sýndi fram. Hóast sáttmálarnir ganga út í summar, hevur hann góðar vónir*

## Hava verið boð eftir OSR

Og hesi árini, OSR hevur virkað, hevur eisini boð verið eftir felagnum at taka olju upp av sjónum ymsastaðni í Føroyum.

– Vit hava verið tilkallaðir nakrar ferðir, har olja er komin á sjógv, bæði í Suðuroy og aðrastaðni, sigur hann.

Hann sigur, at í fjør reinsaði útgerð hjá OSR eini 90-100 kubikk av olju upp av sjónum ymsastaðni í Føroyum, so tað er ikki so lítið, tí tað er dálking, sum hevði sæst aftur á einum føroyskum fjørði.

Størsta uppgávan var í Søldafirði, har felagið tók 30 kubikk upp av sjónum eftir eitt óhapp og tað var tað størsta, einstaka óhppið.

Pauli Einarson sigur, at hinvegin eigur landið at hava eina tilbúgving og hann vónar eisini at OSR kann verða ein partur av tí.

– Eg vænti, at tað fer a bera til at fáa eina avtalu við landsmyndugleikarnar um eina tilbúgving í sambandi við dálking.

Her kann vísast til, at í tele-fonbókini er ein listi yvir, hvussu og hvar fráboðast skal, tá ið dálking er hend ávikavist á landi og á sjónum og í báðum førum sæst, at OSR er ein partur av tilbúgvingini.

Í hesum sambandi hevur OSR útgerð ymsastaðni í Føroyum. Samstundis hevur felagið havt fólk til venjingar, bæði í Noregi og í Bretlandi. Men felagið kann eisini sjálvt standa fyri at venja onnur í at brúka slíka útgerð, tí tað hevur fingið venjaraprógv á økinum.

– Men fæst ein avtala við kandið og kommunur, er tað kanska eisini rætt at fáa eina greiða avtalu við land og kommunur um, hvussu farast skal fram í sambandi við dálking aðrastaðni.

# Drelnes skal brúkast ímeðan tað bíðar

**Nú verða onkrar forðingar beindar av vegnum sum gjørdu, at Drelnes ikki kundi blíva oljuhavn**

DRELNES
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á Tvøroyri eru teir framvegis til reiðar at bjóða seg fram til oljuhavn.

Hóast ongi útlit eru til nakra beinleiðis oljuvinnu í bræði, liggur havnin á Drelnesi framvegis klár at hýsa eini oljuvinnu.

Og nú er hon kanska meiri klár enn nakrantíð.

Um eitt hálvt ár fer Smyril fast atløgupláss í nýggju havnini. Sostatt er Drelnes tók til oljuhavn burturav.

Samstundis upplýsir Heri Mortensen, formaður í teknisku nevnd hjá býráðnum, at tekniska nevndin hjá býráðnum hevur samtykt, at sprongja eina grynnu burtur, sum er tætt við innsiglingina til havnina á Drelnesi.

Tá ið tað varð gjørt av, at Runavík skuldi verða oljuhavn, var dýpið á Drelnesi ført fram um ein orsøk til at



*À Drelnesi eru tey greið yvir, at har verður ongin oljuhavn við tað fyrsta. Men teir eru framvegis til reiðar og ímeðan teir bíða, er ætlanin at hava annað virksemið á Drelnesi*

vraka Trongisvágsfjørð.

Samstundis fær hendan sama grynnan skyldina fyri, at tað er so nógvur suður í havnini.

Men nú er gjørt av, at grynnan skal sprongjast burtur, so at dýpið allastaðni verður átta metrar.

Articon skal gera arbeiðið, nú teir kortini eru á fjørðinum og gera nýggju samferðsluhavnina.

Talan er um eitt arbeiðið, sum kostar í mesta lagi 300.000 krónur.

Hann sigur, at somuleiðis hevur býráðið samtykt at gera ábøtur á gomlu havnina á Drelnesi fyri at styrkja hana aftur, har hon er farin eitt sindur.

## Ætla at gera stórt øki

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at hóast ongin oljuhavn verður á Drelnesi enn, verður avtalan við Norserv ikki rørd og felagið kemur sostatt at hava rætt til økið fram til 2010.

Borgarstjórin sigur, at verður ætlaði Hovstunnilin gjørdur í neðra, roynir Tvøroyrar Kommuna at fáa grótið úr tunlinum at fylla upp við framvið Drelnesi og úteftir, so har fæst eitt veldugt økið til havnarpláss.

– Sostatt skuldu umstøðurnar hjá eini møguligari oljuvinnu bara batna, men skuldi tað verið, ber eisini møguligt at hava okkurt annað virksemið á økinum. Men tað má so vera í samráð við Norserv.

Henrik Thomsen í Norserv sigur, at teir ætla framvegis at hava økið tøkt til oljuvinnu.

Men nú onki sær út til at henda í bræði, er ikki ætlanin at økið skal liggja deytt.

Norserv arbeiðir nevniliga við at fáa okkurt annað virksemi á økinum.

Hann sigur, at tað er ov tíðliga at siga, hvat tað er, men talan er um virksemi, sum hevur við skipaavgreiðslur at gera og sum kann skapa eitt ávíst virksemi.

– Men er virksemið á økinum, er tað altíð lættari at koma ígongd við oljuvinnuni eisini, skuldi høvið býðst, sigur hann.

So ætlanin við oljuhavnini er als ikki slept.

– Verður meiri virksemi innan leiting, ella verður olja funnin, fara vit at bjóða okkum fram, sigur Henrik Thomsen.

Nú verður so dýpt framvið havnini, men seta oljufeløgini onnur krøv, verður tað tikið upp til tað tíð. Í øllum førum væntar Henrik Thomsen ikki, at slíkar forðingar fara at gera seg galdandi aftur, sum tað gjørdu seinast, eitt nú, at havnin ikki var nóg sterk.



Visti tú hetta um EIMSKIP?

* at Eimskip er millum tey størstu feløgini í Norðurhøvum
* at Eimskip hevur 21 skrivstovur í 11 londum
* at Eimskip kring allan heimin veitir breiða tænastu innan flutning sjógvegis, landvegis og loftvegis
* at Eimskip siglir úr USA, Canada og Grønlandi til Føroyar
* at Eimskip fermir beinleiðis úr Hollandi, Týsklandi, Bretlandi, Danmark, Svøríki og Noregi til Føroyar



STEPHANSSONS HÚS. TLF. 31 42 91

GREIÐ LEIÐ EIMSKIP

Eystara Bryggja, Postboks 100, FO-110 Tórshavn, Tlf. 347000, www.eimskip.fo